

# Bagger skyldar upp á fransmenn

Stein Bagger vil nú vera við, at tað vóru fransmenn, sum noyddu seg til at svika við virkseminum í fyritøkuni IT Factory. Tað skrivar Berlingske Tidende. Sambært blaðnum hevur Bagger sagt í rættinum í Lyngby, at tann, sum legði trýst á seg, kravdi at fáa pengar og fekk níggju milliónir evrur. Í rættinum kom fram, at Stein Bagger fekk níggju milliónir evrur frá sínum svenska vinmanni Mikael Ljungmann í 2007 og 2008. Sambært Bagger hildu tveir menn alla tíðina eyga við honum, og tí vistu fransmenninir altíð, hvar hann var, skrivar Berlingske Tidende.

# Kvinnur arbeiða minni enn menn

Kvinnur arbeiðs færri tímar enn menn, og kvinnur, sum hava smábørn ella fleiri børn, arbeiða færri tímar enn aðrar kvinnur. Tað er niðurstøðan í einari danskari kanning, sum bleiv almannakunngjørd í morgun. Í henni sæst, at kvinnur, sum fáa fasta løn, arbeiða í meðal 34,13 tímar um vikuna, meðan menn við fastari løn arbeiða 36,48 tímar um vikuna. Hjá tímaløntum kvinnum er tímatalið 28,49, og hjá tímaløntum monnum er tað 31,84. Kanningin vísir eisini, at fólk, sum arbeiða hjá donskum kommunum, arbeiða færri tímar enn fólk, sum arbeiða í privatu vinnuni.

*Tað hevur leingi verið bíðað eftir útgávuni hjá Crawling Blue. Ikki minni enn tvey ár hevur fløgan verið ávegis, og lítil ivi tykist vera um, at blues tónleikurin hjá Crawling Blue er saknaður*

*Savnsmynd*



Hansen á tangentum eisini á pallin. Einki kann takast frá blues tónleikinum hjá teimum upprunaligu fýra limunum, men saman við báðum blásarunum lyftist konsertin upp á eitt annað støði. Saman við undirgrundshuglagnum og skiftandi ljósinum á pallinum, minti konsertin stundum um tær væl kendu ketturnar úr Aristocats, sum ovurfegnar syngja og dansa aftur við sínum tónleiki.

## Oyrahangarin The Well

Her skal sigast, at hvørki Uni R. Debess ella nakar annar hoppaði ella dansaði á pallinum, men spæligleðin var ikki til at taka feil av. Tað varð uttan iva hoppað og dansað innaní. Forsangarin greiddi róliga og á mest óhátíðarliga hátt áhoyrarunum frá um løgini. Hann hevði so nógvar gittarar við sær hetta kvøldið, at hann næstan ørkymlaðist av at skifta í millum teirra, og Óli Olsen skifti millum sína urgu og rhodes ljóðføri, væl stuðlaður av Kim Hansen, ið sat við tangentarnar í hinum endanum á pallinum.

Tey flestu á pallinum eru royndir tónleikarar í Føroyum. Ein traðkar kortini veruliga í karakter í blueshøpi, og er tað forsangarin sjálvur. Uni R. Debess er ein frálíkur frontmaður við sínum deiliga sangi og avslappaða verumáta á palli. Líka síðan hann kom úr skápinum sum tónleikari, hevur hann trúliga hildið seg til sína tónleikasjangru, nevniliga blues, og er hetta vorðið hansara vørumerki í Føroyum. Og eftir reaktiónunum frá áhoyrarunum, var blues tónleikurin saknaður millum fólk, og vóru tey fegin um aftur at hoyra blues frá hansara hond.

Tá konsertin kom at enda, og Hanus G. Johansen og Sámal Ravnsfjall høvdu sungið Bob Dylan'sa »All Along The Watchtower« saman við Una R. Debess, takkaði Crawling Blue fyri seg og fóru limirnir av palli. Teir sluppu kortini ikki so lætt, tí fólk reistust klappandi úr stólunum, og vildu hava blues'arnar inn aftur á pall, og sýndu harvið sína tøkk fyri konsertina. Nøkur løg høvdu teir í ermuni til eykanummur, millum annað eitt lag, forsangarin hevði skrivað til mammu sína, og sum fekk eitt »Áááááh«, at ljóða gjøgnum salin.

Konsertin varð komin at enda hetta kalda leygarkvøldið í mars mánaði. Tað skiltist á fólki, at tey vóru væl nøgd við konsertina hjá Crawling Blue. Og sum svar til spurningin, ið varð reistur fyrr í greinini, var onkur oyrahangari at finna millum góðu løgini hjá bólkinum. Til dømis heitislagið á fløguni, The Well, ljóðaði fantastiska væl, og verður tað helst eitt lag, ið verður sent í umfar á føroysku rásunum.

Crawling Blue hevur ætlanir um at fara á konsertferð kring landið, og kann hendan konsertin róliga viðmælast.